# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 23. februar 2015, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Hilbert Elisson, Jógvan Emil Nielsen, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og Øssur Christiansen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur John Zachariassen biðið og fingið játtað farloyvi frá 15. januar 2015 til 5. mars 201.
Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 23. februar 2015. Hann játtaði at møta á fundinum.

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Karl A. Olsen tann 6.februar 2015 boðað frá, at honum berst frá at møta á fundinum vegna arbeiði.
Tiltakslimurin Jógvan Emil Nielsen fekk fundarboð sama dag. Hann játtaði at møta á fundinum.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimum eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssuri Christiansen og Jógvan Emil Nielsen sum tiltakslimir.

Borgarstjórin kunnaði um, at síðani skráin varð løgd, er eitt mál komið avtrat: val av limi í nevndina fyri Vestmanna Bygdarsavn. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um loyvi at seta málið á skránna sum mál 130.
Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 126**
Umsókn frá Jan Erik Pedersen um sundurbýti av matr. nr. 60a, ogn hjá Gunnari Mikkelsen, Sjúrðargøta 6, 512 Norðagøta, soleiðis: At býta 2 gyllin og 10 skinn í Heimaruhelvt á Bjørgum matr. nr. 362a frá 60a, at leggja saman við 191a í Heimaruhelvt á Bjørgum matr. nr. 362a.
J.nr. 01.04.00-G01-2-15

**Viðv. 126**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, mælti til at viðmæla umsóknini.
Tilmælið varð einmæt samtykt.

**Mál 127**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um avtøku av kirkjugarðsnevndini.
J.nr. 04.31.00-P00-1-15
Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. februar 2015 málið um dagføring av kirkjugarðsreglugerðini.

Á fundinum samtykti nevndin at mæla bygdarráðnum til at avtaka kirkjugarðsnevndina, og í staðin at leggja málsøkið/dagligu umsitingina av kirkjugørðunum undir teknisku deild/teknisku nevnd.

**Viðv. 127**
Malan Stórá, forkvinna í Trivnaðar- og umhvørvisnevndini, setti fram broytingaruppskot, har ið hon mælti til at samtykkja at avtaka kirkjugarðsnevndina, og í staðin at leggja málsøkið/dagligu umsitingina av kirkjugørðunum undir Trivnaðar- og umhvørvisnevndina.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið frá Maluni Stórá, forkvinnu í Trivnaðar- og umhvørvisnevndini. Uppskortið varð einmælt samtykt. Atkvøtt varð tí ikki um upprunaliga tilmælið.

**Mál 128**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um umsókn frá 07 Vestur um stuðul til virksemi felagsins.
J.nr. 20.00.00-Ø40-4-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 18. februar 2015 umsókn frá 07 Vestur um stuðul til virksemi felagsins.
Nevndin samtykti at leggja málið fyri bygdarráðið til støðutakan.

**Viðv. 128**
Durita á Heygum skjeyt upp at samtykkja ikki at játta rakstrarstuðul, men at játta ein stuðul á kr. 15.000 og at treyta stuðulin av at felagið skipar fyri koyring av vestmanna-børnum til og frá venjingum í Vágum.
Uppskotið varð einmælt samtykt.

**Mál 130**
Áheitan frá nevndini fyri Vestmanna Bygdarsavn um at velja nýggjan lim nevndina.
J.nr. 19.03.00-G01-1-15

Sambært viðtøkunum fyri Vestmanna Bygdarsavn verða 2 nevndarlimir valdir eftir bygdar-ráðsvalið (í 2012); annar skal vera formaðurin í mentanarnevndini. 3 nevndarlimurin verður valdur, tá bygdarráðssetan er komin í helvt (des. 2014).
Durita á Heygum (formaður í mentanarnevndini) og Malan Stórá eru valdar í 2012. Karl A. Olsen, formaður, er valdur fyrr og eigur tí at standa fyri vali.

Bygdarsavnsnevndin hevur ikki nakað uppskot til nýggjan nevndarlim, og heitir tí á bygdarráðið um at velja nýggjan lim.

**Viðv. 130**
Hilbert Elisson skjeyt upp at velja Bjarke Thastrup til nýggjan lim í bygdarsavnsnevndina.
Uppskotið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Hilbert Elisson Øssur Christiansen

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen Jógvan Emil Nielsen